## Tyson tapti enn einaferð

Fyrrverandi heimsmeistarin í tungvektsboksing, Mike Tyson, noyddist leygarkvøldið enn einaferð at lúta í einum boksiringi.

38 ára gamli Mike Tyson dystaðist við bretan Danny Williams. Tyson byrjaði dystin betur, men so líðandi kom bretin fyri seg. Í fjórða umfari fekk Williams 16 sløg á rað, sum raktu Tyson, og tað var nóg mikið til at taka beinini undan fyrrverandi heimsmeistarunum.

Hetta var fimti ósigurin hjá Mike Tyson, og alt bendir á, at hansara dagar í boksielituni eru taldir.

## Rumbul í enska fótbóltssambandinum

Stjórin í enska fótbóltssambandinum segði seg sunnudagin úr starvinum í sambandi við eina gølu, har Sven Gøran Eriksson eisini er í vanda fyri at fáa fótin.

Mark Palios, sum stjórin í FA kallast, segði seg úr starvi í gjár, tí at hann hevur innblandaður í gøluna. Gølan snýr seg um, at Sven Gøran Eriksson hevur havt eitt kærleiksævintýr við ein skrivara í FA, sum Palios eisini hevur havt kynsligt samband við.

Støðan í FA er nú so mikið spent, at fleiri enskir miðlar vilja verða við, at Eriksson seinni í vikuni fer at fáa sekkkin.

## Prinsurin vann kappkoyring

Prins Joakim vann sunnudagin Copenhagen Historic Grand Prix í hjartanum av Keypmannahavn.

Kappkoyringin við gomlum søguligum bilum hevði luttøku av fleiri royndum kappkoyrarum, ið hava koyringina sum sítt livibreyð, men hóast hetta, eydnaðist tað danska prinsinum at vinna kappingina. Koyrt varð á einari avmarkari breyt í Fælledparkini í hjartanum av Keypmannahavn.

## Troyggjan hjá Armstrong seld fyri 45.000

Ein av gulu leiðslutroyggjunum hjá Lance Armstrong bleiv í gjár seld fyri 45.000 krónur.

Troyggjan bleiv seld á uppboðssølu í París, og hægsta boðið var 45.000 krónur.

Allur peningurin, ið kom inn í sambandi við søluna av gulu føraratroyggjuni, fer óskerdur til ein krabbameinsstovn í kekkiska høvuðsstaðnum Prag.

Lance Armstrong hevur sjálvur verið raktur av krabbamein, men er tíbetur blivin frískur.

## Smicer skaddur í hálvt ár

Kekkiski landsliðsleikarin hjá Liverpool, Vladimir Smicer, verður ikki at síggja á vøllinum næsta hálva árið.

Í venjingardysti móti FC Porto í gjár meiddi Smicer seg so illa, at læknarnir siga, at hann ikki verður at síggja á vøllinum aftur næsta hálva árið.

Uppihaldið hjá Smicer í Liverpool hevur verið nógv darvað av skaða, men seinastu mánaðirnar hevur tað staðið væl til. Nú noyðist Smicer so aftur at sita langa tíð á áskoðaraplássunum.

## Dystir í dag:

**kl. 19.00**
B68-KÍ Toftir Dómari: Oddmar Andreasen

**kl. 19.00**
EB/Streymur-B36 Eiði: Dómari: Dagfinn Olsen

# FCK framvegis ikki fingið fult



*Todi Jónsson var sunnudagin millum teir fyrstu ellivu hjá FC Keypmannahavn, sum í evstu løtu fekk ein 2-2 javnleik móti Esbjerg í Parkini*

**Hesa ferð eydnaðist tað akkurát at fáa eitt stig á heimavølli ímóti Esbjerg, sum eina løtu var frammanfyri við tveimum málum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum hevði Todi Jónsson sunnudagin fingið pláss millum teir fyrstu ellivu hjá FCK. Todi var á vøllinum í 52 minuttir. So varð hann skiftur út. Tølini siga, at tað gekk væl betur hjá FCK, eftir at føroyski álopsspælarin var farin av vøllinum, enn tað hevði gjørt frammanundan.

Í góðverðrinum vóru 22.227 í Parkini. Tey vóru vitni til, at Esbjerg var meiri sannførandi og legði seg framum bæði 1-0 og 2-0. Fyrra málið fingu teir miðskeiðis í 1. hálvleiki eftir horna.

Fimm minuttir eftir steðgin økti Esbjerg eftir fínt innlegg úr høgru og til handara stólpan til 2-0. So avgjørdi FCK venjarin, Hans Backe, sum frammanundan av starvsfeløgum sínum var kosin ársins venjari, at Todi og Thomas Røll skuldu skiftast út. Á vøllin komu Peter Møller og Jesper Bech, og serliga hesin seinni var við til at seta ferð á FCK spælið.

Hjalte Nørregaard stútaði ímóti málinum, bólturin rakti í mótstøðumann og snýtti Esbjerg málverjan. So var eitt mál á muni og síðsta hálva tíman var FCK greitt omaná. Miðverjin Ole Tobiasen javnaði, tá ið sekundvísarin var síðstu ferð á veg runt.

Í tveimum teimum fyrstu umførunum hevur FCK spælt tvær ferðir 2-2. Hans Backe segði seg hesa ferð vera nøgdan við avrikið síðsta hálva tíman, og hann legði afturat, at hann sá tað sum íløgu í framtíðina, at Thomas Røll og Todi Jónsson, sum báðir vóru nógv skaddir fyrr á árinum, fingu spælitíð.

Í Danmark verður mett, at teir í FCK hugsa so mikið um Europa Cup, at tað gongur eitt sindur út yvir avrikini í landskappingini. FCK venjarin undirstrikar, at tað, sum ræður um, er at hava flest stig eftir øll 33 umførini, og tað sigur hann seg framvegis hava gott mót um, at hansara lið fer at hava.

### FCM oddalið

Í Brøndby eydnaðist tað heimaliðnum at vinna 2-0 á Viborg. Málini komu ikki fyrrenn síðsta korterið. Talan var um gott undirhald, og bæði liðini høvdu fleiri upplagdar málmøguleikar. Hjá Brøndby, sum í fyrsta umfarinum tapti á heimavølli ímóti OB, var sigurin sera kærkomin.

Oddalið eftir tvey tey fyrstu umførini er FCM. Leygardagin vunnu teir í fínari uppgerð 2-1 á heimavølli ímóti OB. Hetta var sjeyndi heimadysturin á rað á nýggja og framvegis navnleysa stadion, at teir fingu fult. Enn eina ferð eydnaðist tað Mohammed Zidan at skora. Hann javnaði til 1-1 við brotssparki, sum varð dømt, tá ið hesin sami spælarin varð feldur.

Mest umrødda støðan yvirhøvur hetta vikuskiftið var tað, tá ið OB í 1. hálvleiki skoraði til 1-0. Steffen Højer pilkaði bóltin frá FCM málverjanum, sum skuldi sparka út. Áskoðanirnar eru ymiskar. Dómarin metti eftir lokið stríð, at hann hevði gjørt eitt mistak, tí hann ikki hevði bríkslað fyri vandamiklum spæli. Ikki øll, sum halda seg hava skil fyri fótbólti, vóru samd við honum í tí sjónarmiðnum.

AaB vann 2-0 á heimavølli ímóti FCN, og Silkeborg vann á heimavølli 3-1 á AGF. Nýggjasta stjørnuskotið í superliguni er Rajko Lekic í Silkeborg, sum hesa ferð skoraði tvey mál og er toppskjútti í superliguni.

Í fyrstu royndini í bestu deildini í mong ár hevði Randers vitjan av Herfølge, sum vann 1-0.

### Støðan

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FC Midtjylland | 2 | 2 | 0 | 0 | 4-2 | 6 |
| 2 Silkeborg (O) | 2 | 1 | 1 | 0 | 5-3 | 4 |
| 3 Herfølge | 2 | 1 | 1 | 0 | 1-0 | 4 |
| 4 AaB | 2 | 1 | 0 | 1 | 3-2 | 3 |
| 5 Brøndby | 2 | 1 | 0 | 1 | 3-2 | 3 |
| 6 OB | 2 | 1 | 0 | 1 | 3-3 | 3 |
| 7 FC København (MP) | 2 | 0 | 2 | 0 | 4-4 | 2 |
| 8 Esbjerg | 1 | 0 | 1 | 0 | 2-2 | 1 |
| 9 AGF | 2 | 0 | 1 | 1 | 3-5 | 1 |
| 10 FC Nordsjælland | 2 | 0 | 1 | 1 | 2-4 | 1 |
| 11 Viborg | 2 | 0 | 1 | 1 | 0-2 | 1 |
| 12 Randers FC (O) | 1 | 0 | 0 | 1 | 0-1 | 0 |



# Góð úrtøka hjá teimum flestu

**Fremad Amager tapti, meðan øll hini feløgini, sum hava føroyingar á liðnum, vunnu í fyrsta umfarinum**

DNMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*



*Hjalgrím Elttør var tann einasti av teimum trimum føroyingunum í Fremad Amager, sum var við frá byrjan, tá ið Fremad Amager tapti 0-1 fyri Skjold*

Í vikuskiftinum fór fótbólturin á rull aftur í næstbestu donsku deildini. Í nýggju kappingini eru fleiri føroyskir fótbóltsspælarar uppií, enn tað áður hava verið í 1. deild í Danmark.

Samlaða talið er sjey. Teir eru tríggir í Fremad Amager - Hjalgrím Elttør, Andrew av Fløtum og Jann Ingi Petersen – tveir í Frem – Jón Rói Jacobsen og Gunnar Nielsen, Christian Høgni Jacobsen í Vejle (hann er framvegis knæskaddur) og Johan Byrial Hansen í Horsens.

Í vikuskiftinum fingu øll feløgini, sum hava føroyingar í hópinum, fult uttan Fremad Amager, sum leygardagin tapti 1-0 á Eysturbrúgv ímóti Skjold.

Hjalgrím Elttør var einasti føroyski spælarin millum teir fyrstu ellivu hjá Fremad Amager. Skjold fekk málið, tá ið ein minuttir restaði av fyrra umfarinum. Í 68. minutti loysti Andrew av Fløtum av á miðvøllinum, og sjey minuttir undan leikloki kom Jann Ingi Petersen á vøllin.

Jón Rói Jacobsen var í miðverjuni, tá ið Frem á heimavøllinum í Valby tók fyrsta stigið á leiðini ímóti superliguni, sum teir ógvuliga fegnir ynskja at flyta upp aftur í beinanvegin. Málini bíðaði inntil í 2. hálvleiki, men Frem vann 2-0. Sagt verður, at Jón Rói Jacobsen var ógvuliga stinnur, og millum viðhaldsfólkini hjá Frem verður hann nevndur sum dagsins maður.

Horsens vann 3-0 í Ølstykke. Eisini har vórðu øll málini skotin eftir steðgin. Á liðnum hjá Horsens vóru fýra spælarar, sum ikki áður hava umboðað felagið. Síðsta kappingarár var tað stórt vónbrot fyri Horsens, at tað kiksaði við uppflytingini.

Síðsta kappingarár var tað um reppið, at Vejle flutti niður í 2. deild. Eftir fyrsta umfarið er Vejle omanfyri røttu strikuna. Við øðrum orðum eru teir á uppflytingarplássi. Fimm nýggir spælarar vóru á liðnum, tá ið Vejle vann 4-1 í Næstved, sum júst er flutt upp í næstbestu deildina. Øll Vejle málini vórðu skorað, tá ið ein hálvur tími var farin.

Ulrik Balling, sum var í NSÍ í fyrraárið, varð beinanvegin eftir steðgin settur inn á Vejle liðið.

Størsta sigurin vann Fredericia á heimavølli ímóti Brønshøj. Úrslitið var 7-0. Brønshøj flutti niður síðsta kappingarár. Tá ið FC Nordjylland varð upployst varð aftur pláss fyri Brønshøj í næstbestu deildini. Úrslitið í fyrsta umfarinum kundi boðað frá, at Brønshøj ikki er rættuliga girað til hesa deildina.

Flest mál vórðu skorað í Køge, har B93 vitjaði. Úrslitið var 4-4. Niðurflytararnir í AB vitjaðu í Haderslev, har teir vunnu 4-2 ímóti SønderjyskE. Úrslitið á gamla Gentofte stadion millum HIK og NFA var 1-1.




*Nýggja felagið hjá Jón Róa Jacobsen, BK Frem, fekk eina góða byrjan upp á kappingarárið, tá ið teir vunnu 2-0 á Dalum*

# ÍBV næstovast

**Ólavsøkuaftan vunnu teir á Heimey sannførandi sigur móti Akureyri og tóku seg harvið fram á næstfremsta plássið**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Íslendska fótbólts landskappingin hevði summarfrí síðsta vikuskifti. Trettanda umfarið verður á skránni sunnudagin og mánadagin.

Ólavsøkuaftan varð síðsti dysturin í tólvta umfarinum spældur. Tá hevði ÍBV á Heymey í Vestmannaoyggjunum vitjan av KA av Akureyri. Heimaliðið vann tryggan 4-0 sigur. Harvið flutti ÍBV fram á næstfremsta plássið. Teir hava 21 stig og eru tvey aftanfyri FH, sum er einsamalt oddalið. Fylkir er besta høvuðsstaðarliðið á triðja plássinum við 20 stigum.



*Hans Fróði Hansen skal saman við Fróða Benjaminsen og hinum í Fram royna at fáa Fram upp um niðurflytingar strikuna*

KA tapið hevði við sær, at teir framvegis eru næstaftast við ellivu stigum. Eitt frammanfyri Fram og eitt aftanfyri Grindavík.

Sunnudagin eru fýra dystir á skránni: KR-ÍBV, FH-Víkingur, KA-ÍA og Keflavík-Fylkir. Í botninum er rættuliga avgerandi uppgerð á skránni mána-kvøldið. Tá fer Fram við Fróða Benjaminsen og Hans Fróða Hansen í hópinum at fáa vitjan av Grindavík. Tann dysturin verður spældur á heimavøllinum hjá Fram, sum er Laugardalsvøllurin.